## Fleiri fáa livraskaða

Norðmenn drekkand munandi meiri alkohol nú enn fyri 10 árum síðani, og nýggj hagtøl vísa, at alt fleiri norðmenn fáa livraskaða orsakað av alkoholi. Teir fyrstu átta mánaðarnar í ár vórðu 1300 fólk løgd inn á sjúkrahús við livraskaða, sum tey høvdu fingið av alkoholi, og læknarnir vænta, at talið fer upp um 2000 innan árslok. Fyrr drukku norðmenn um vikuskiftið, men nú drekka teir eisini aðrar dagar, og tað sæst aftur.

## Blað skelkar

Í Malaysia eru myndugleikarnir í øðini, eftir at blaðið The Weekend Mail hevur prentað fleiri greinar um sexvanarnar hjá teimum ungu í landinum. Najib Razak, varaforsætisráðharri, sigur seg hava fingið fleiri uppringingar og eina rúgvu av SMS-boðum frá fólki, sum eru skelkað av teirri opinskáraðu lýsingini av sexvanunum hjá ungfólki. Harafturímóti siga lesararnir hjá The Weekend Mail, at teir vilja fegnir lesa um evnið.

# Gevið mær demokrati

**Í morgin, týsdagin, kemur málið um tey samkyndu fyri tingið til fyrstu viðgerð, og tí hava vit fingið orðið á Rasmus Rasmussen, ið gjørdist ein av høvuðspersónunum í málinum, og biðji hann um hansara viðmerkingar**

SAMKYND
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Í morgin, týsdagin, kemur málið um tey samkyndu fyri tingið til fyrstu viðgerð. Skal "kynslig orientering" skoytast upp í anti-diskriminatiónslógina ella ikki? Tað er spurningurin, sum allir løgtingslimir skulu taka støðu til, tá atkvøðast skal, og tað er ein spurningurin sum flestir føroyingar hava helst hugsað um, nú málið hevur fylgt so mikið nógv í fjølmiðlunum – bæði her heima og ikki minst uttanlands.

Tað er í hesum samanhangi, at vit hava ringt til Rasmus Rasmussen. Maðurin, sum nokk er størsta orsøkin til kjakið um samkynd, og at løgtingið nú skal til at viðgera málið.

### Somu rættindi

Rasmus Rasmussen játtar at gera sínar viðmerkingar, og sigur sum tað fyrsta, at hann sum samkyndur føroyingur ynskir, at hann eins og aðrir samkyndir føroyingar fáa somu grundleggjandi rættindi sum onnur.

Tað sigur hann sum føroyingur og sum samkyndur, men Rasmus følir eisini, at hann sum demokratur má tala at í hesum málinum.

– Sum demokratur má eg tala at. Demokratar krevja, at øll verða viðfarin eins – at øll kunnu liva á sama stað og í frið og náðum. Men spyrt tú meg, so kann eg ikki siga ja til, at vit hava demokrati í Føroyum, sigur Rasmus Rasmussen.

– Ljóðar hetta rætt, tá tú lesur hetta, so haldi eg, at tú skalt tala at, sigur Rasmus.



*– Demokratar krevja, at øll verða viðfarin eins – at øll kunnu liva á sama stað og í frið og náðum. Men spyrt tú meg, so kann eg ikki siga ja til, at vit hava demokrati í Føroyum, sigur Rasmus Rasmussen*

*Mynd Jens Kristian Vang*

### Stuðul troystar

Og tað eru eisini fólk, sum hava átala støðuna í Føroyum. Millum annað føroyskir politikarar, løgmaður og eisini danski forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmusssen.

– Tað er ein troyst, at merkja stuðul aðrastaðni frá. Serliga úr Íslandi og Danmark og eisini øðrum londum, sum virða samkynd, havi eg fingið stuðul, greiður Rasmus frá.

### Nógv fyri

Á heysti 2005 hevði løgtingið støðuna hjá teimum samkyndu í Føroyum til viðgerðar. Tá varð atkvøtt, um samkynd skulu verða vard av anti-diskriminatiónslógini. Úrslitið tá var, at 20 vóru ímóti hesum og 12 vóru fyri. Í dag er greitt, at støðan á politiska pallinum hesum viðvíkjandi ikki er tann sama. Spurningurin er bara, hvussu nógvir av tinglimunum hava broytt støðu.

Tá eg so spyrji Rasmus, um hann hevði gjørt sær nakrar tankar um, at hann kann vera beinleiðis orsøkin til, at ein lógarbroyting kann koma, sum tryggjar samkyndum í Føroyum betri sømdir, svarar hann hugtungur á málinum:

– Ja, tað havi eg faktiskt hugsað um. Og eg má siga, at um so er, so er tað nógv fyri, sigur Rasmus Rasmussen at enda.

# Løgtingið kann bara atkvøða ja til broyting í revsilógin

**Bæði Høgni Hoydal og Jóannes Eidesgaard eru samdir við útleggingini hjá Halgir Winther Poulsen um, at løgtingið hevur bundið seg at verja tey samkyndu við mannarættindasáttmálanum**

SAMKYND
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Tað var eitt einmælt løgting, sum samtykti mannarættindasáttmálan, og tí er tað púra rætt sum Halgir Winther Poulsen skrivaði í Sosialinum leygardagin, at tingfólk kunnu ikki annnað enn atkvøða fyri broytingini í revsilógini, sum nú er frammi í sambandi við rættindini hjá teimum samkyndu, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

Halgir Winther Poulsen, advokatur, segði í grein í Sosialinum leygardagin, at europeiski mannarættindasáttmálin eftir einmæltari løgtinssamtykt er settur í gildi í Føroyum sum partur av føroyskari løggávu. Harvið eru eisini dómarnirhjámannarættindadómstólinum bindandi fyri føroyska løggávu og umsiting, sigur Halgir Winther Poulsen.

Hann sigur víðari, at dómstólurin dømir, at samkynd eru vard av grein 8 og í grein 14 í mannarættindasáttmálanum. Tað er sostatt í stríð við sáttmálan at gera mannamun móti samkyndum og Føroyar, ella heldur Danmark sum sáttmálapartur, kunnu tí rokna við at verða dømd fyri sáttmálabrot, um tílíkur mannamunur framhaldandi verður gjørdur í Føroyum, sigur Halgir Winther Poulsen.

Niðurstøðan hjá Halgir Winther Poulsen er, hetta eigur at geva okkara løggevarum nakað at hugsa um, nú teir á ørðum sinni skulu undir at viðgera samkynd og teirra rættarstøðu í føroyska samfelagum.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður er sera fegin um hesa útleggingina hjá Halgir Winther Poulsen.

- Um hatta kann gera, at nøkur tingfólk skifta støðu í málinum og atkvøða fyri, so hevur greinin gjørt stórt gagn, sigur hann.

Løgmaður vísir á, at tað eru nøkur tingfólk sum eru fyri og onnur sum eru ímóti. Men nøkur av teimum, sum eru ímóti, eru ímóti vegna sína kristnu trúgv og tulking av bíbliuni.

Løgmaður væntar ikki, at hesi skifta hugsan av greinini hjá Halgir Winther Poulsen, men hann væntar at nøkur av teimum, sum vóru ivandi, nú hava nú fingið góðar grundgevingar til tess at skifta hugsa og atkvøða fyri.

Høgni Hoydal sigur, at greinin hjá Halgir Winther Poulsen er sera væl grundað. Hann vísir á, at føroysk løggáva í alt ov lítlan mun byggir á altjóða bindingar. Hann ivast eisini í, um tað verður øðrvísi hesaferð.

–Viðgerðin í rættarnevndini seinast vísti týðuliga, at altjóða perspektiv als ikki vórðu tikin við í viðgerðina. Men um rættarnevndin hesaferð tekur altjóða atlit og sakligar grundgevingar við, so verður kanska ein broyting, heldur Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins.